gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Støðan millum Danmark og Føroyar versnar alsamt!

### *Oddagrein*

TAÐ tykist, at politiska støðan millum Føroyar og Danmark gerst verri fyri hvønn mánað, sum gongur. Fleiri dømi eru um, at danir annaðhvørt leggja seg úti í viðurskifti, sum teir ikki hava havt við at gera áður ella sýta fyri at ganga ynskjum hjá landsstýrinum á møti.

SAMRÁÐINGARNAR í juni mánað, tá danska stjórnin helt fast um, at hon vil ikki ganga við til eina longri skiftistíð enn fýra ár, bøttu ikki støðuna. Heldur ikki óbeinleiðis hóttanin um, at heildarveitingin úr Danmark fer at lækka kortini, tí livistøðið er hægri í Føroyum enn í summum donskum landslutum.

EFTIR at landsstýrið hevði sent ST ein fyrispurning um mannagongdir við atliti til ST í samband við samráðingarnar at skipa Føroyar sum fullveldi, var danski uttanríkisráðharrin alt annað enn blíður, og gjørdi greitt, at hesum átti føroyska heimastýri at halda fingrarnar burturi frá. Man henda støðan hava ávirkað svarið úr ST?

ÚR einum føroyskum tjóðskaparligum sjónarhorni hevur danska stjórnin ikki handfarið spurningin um føroyska málið serliga heppið, nú tað er staðfest sum eitt minnilutamál, og er gingin beint ímóti áskoðanini hjá landsstýrinum og meginpartinum av Føroya fólki.

FYRST í vikuni vistu Dagblaðið og Útvarpið, at danska uttanríkisráðið hevur lagt seg upp í eina ætlan hjá Føroyum, Íslandi og Grønlandi at gera eina avtalu um, hvussu londini skulu umsita tveir fiskastovnar, sum londini hava í felag. Uttanríkisráðið krevur, at tað skal góðkenna avtaluna, hóast føroyingar og íslendingar hava samráðst um fiskiveiðiavtalur hjá hvørjum øðrum í mong ár, uttan at danir hava eygleiðara við. Tað er ikki nøkur saklig grund fyri, at stjórnin leggur seg út í hesi viðurskifti og kann ikki vera annað enn smáimperialisma.

OG sum rosinan í pylsuendanum noktar danski uttanríksiráðaharrin - okkara uttanríkisráðharri - at fáa í lag ein fund millum løgmann og aðalskrivaran í NATO, nú ein ráðstevna um framtíðar trygdarpolitisku viðurskiftini í Norðuratlantshavi verða umrødd í Reykjavík. Grundgevingin hjá Anfinni Kalsberg er, at Føroyar sum eitt møguligt fullveldi mugu taka ábyrgd í trygdarspurninginum og tryggja javnvág í hesum øki. Men hetta hóvar ikki donsku stjórnini, sum heldur, at »tiden er ikke inde til en direkte drøftelse mellem landsstyret og NATO om disse spørgsmål«. Ein eyðmýking afturat, sum ikki bøtir um viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, men heldur er góður politiskur viðførningur hjá mest víðgongdu loysingarveinginum.

***Sosialurin***

# Pan Fish 49% í »Krúnuni«

*Norska blaðið Fiskaren skrivar, at Pan Fish hevur keypt 49 prosent av partapenginum í føroyska skipinum »Krúnan«*

ÓLAVUR Í BEITI

Pan Fish hevur keypt seg inn í føroysku alivinnuna og nú roynir norska felagið eisini at keypa seg inn í føroysk nótskip. Fiskaren skrivar, at Pan Fish hevur keypt seg inn í 4 reiðarí og eitt av teimum er føroyska felagið, sum eigur »Krúnuna«.

Tey fýra nótaskipini, sum Pan Fish hevur keypt seg inn í eru «Havbas», «Kamøyfisk», «Østerbris» og »Krúnan«, og í øllum førum er talan um 49 prosent.

Multifisk eigur »Havbas«, Tromsø, Edmund Brynjulfsen í Kamøyfisk AS eigur «Kamøyfisk», »Østerbris« eigur AS Olav Østervold og »Krúnuna« eigur føroyska felagið AS Djúphav, skrivar Fiskaren.

**Tryggja sær rávøru**
Í tíðindaskrivi frá felagnum verður sagt, at til tess at tryggja sær framleiðsluna í alingini av laksi, hevur Pan Fish ASA keypt seg inn í hesi feløgini.

Og nótaskipini verða so øll løgd í eitt felag, Pan Pelagic ASA, sum er undir stovnan og seinni í ár verður felagið so børsnoterað.

# Fiskimálastýrið einki hoyrt

*Vit skulu góðkenna allar broytingar sum fara fram í sambandi við broytingar í eigaraviðurskiftunum, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri*

ÓLAVUR Í BEITI

Í sambandi við tíðindini í »Fiskaren«, setti Internet Sosialurin seg í samband við fiskimálaráðharran Jørgen Niclasen, men hann kendi einki til nakrar broytingar í eigaraviðurskiftunum í felagnum, sum eigur nótabátin »Krúnuna«.

– Vit skulu góðkenna allar broytingar, sum fara fram í eigaraviðurskiftunum og hin vegin, so kunnu útlendingar ikki eiga meiri enn 33 prosent í einum føroyksum felag, leggur fiskimálaráðharrin afturat.

Í lógini stendur eisini, at boðast skal frá, um broytingar verða framdar og eingin fráboðan er komin til Fiskimálastýrið enn sambært fiskimálaráðharranum.

# Gongst væl hjá Borðoyarnesi

*Fyrsti føroyski verksmiðju-krabbabáturin »Borðoyarnes« fór úr Føroyum 13. august og higartil hevur alt riggað væl á krabbaverk-smiðjuni umborð*




*»Borðoyarnes«*

ÓLAVUR Í BEITI

Samstarvsavtala er gjørd millum føroyska felagið, sum eigur »Borðoyarnes«, og grønlendska felagið Ikkamiut Seafood, har føroyska felagið m.a. leigar krabbabátin til grønlendingar og reiðar hann út.

Nýggj krabbaverksmiðja er sett umborð á »Borðoyarnes« og sambært reiðarínum sum eigur »Borðoyarnes«, hevur riggað væl higartil hjá krabbabátinum sum er tann fyrsti rættiligi føroyski krabbabáturin.

Í løtuni liggur »Borðoyarnes« millum Nuuk og Sukurtoppin og innhandlar krabba, og sambært reiðarínum er prísurin á krabba góður.

25 mans eru við »Borðoyarnesi«.

**»Artic Star«**
Í morgin kemur grønlendski krabbabáturin »Artic Star« á Fuglafjørð á veg yvur til Grønlands. »Artic Star« er umbygdur til krabbabát í Noregi. Felagið Artic Wolf eigur báðar krabbabátarnar »Artic Star« og »Artic Wolf«.

Krabbabáturin »Artic Wolf« fiskaði fyri 100 mió. krónur í fjør, og áhugin fyri krabbaveiðuni í Grønlandi er rættiliga stórur í løtuni.

**Tøkk**

Hjartans tøkk til tykkum øll, ið gjørdu mær 75 ára dagin ógloymandi.

**Allan Næs, Hvalba**

gult cyan magenta svart



# Kósin nýggjan stjóra

*Adrian Dalsá avloysir Hanus Hansen sum stjóra á Kósavirkinum í Klaksvík*



*Kósavirkið í Klaksvík hevur nú fingið nýggjan stjóra*

EYÐUN KLAKSTEIN

**Klaksvík:** Mánadagin setti nýggjur maður seg í stjórasessin á Kósavirkinum í Klaksvík.

Tað er Adrian Dalsá, sum nú avloysir Hanus Hansen í hesum sessi.

Hanus Hansen heldur fram sum stjóri í JFK, sum eigur 95% av partapeninginum í Kósavirkinum.

- Kósin hevur brúk fyri einum stjóra, sum er á virkinum hvønn dag, og tað havi eg ikki stundir til. Vit hava nógv annað virksemi, sum eg eisini má taka mær av, og tí hava vit funnið ein góðan mann til Kósavirkið, sigur Hanus Hansen.

Adrian Dalsá hevur áður starvast á Kósini, men nú er hann komin heim úr Noregi, har hann hevur starvast á einum flakavirki.

# Karsten stillar uppaftur

*Allir býráðslimirnir hjá Tjóðveldisflokkinum í Klaksvík stilla uppaftur á valinum í heyst*

EYÐUN KLAKSTEIN

**Klaksvík:** Nú tykist tað verða greitt, at Karsten Hansen, landsstýrismaður, stillar uppaftur til býráðsvalið í Klaksvík í heyst. Og tað gera hinir býráðslimirnir hjá Tjóðveldisflokkinum eisini.

Mánadagin varð fyrsti uppstillingarfundur hjá Tjóðveldisflokkinum í Klaksvík, og á hesum fundi boðaði Karsten Hansen frá, at hann varð sinnaður at stilla uppaftur.

Karsten Hansen var fyrstvaldur á Tjóðveldislistanum á seinasta býráðsvalinum. Hann hevur sitið í býráðnum í Klaksvík síðani 1989 og var varaborgarstjóri frá 1993 til hann gjørdist landsstýrismaður í fíggjarmálum fyri stívliga tveimum árum síðani.



*Landsstýrismaðurin Karsten Hansen stillar upp á býráðsvalinum í heyst*

**Ivaðist**
Karsten Hansen hevur ivast í, um hann skuldi stilla upp til býráðsvalið aftur, nú hann er landsstýrismaðurin og verður sitandi í hvussu so er í hálvtannað ár afturat um alt gongst sum ætlað. Hesa tíðina kann hann ikki røkja býráðsessin í Klaksvík.

Men Karsten Hansen hevur ført fram, at hann framvegis hevur stóran áhuga fyri býráðspolitikki, og tað hevur fingið hann at stilla uppaftur.

Umframt Karsten Hansen var Steinbjørn Jacobsen eisini valdur í býráðið seinast. Hann stillar uppaftur, og tað ger varamaðurin hjá Karsteni, Hergerð Joensen, eisini. Næsti uppstillingarfundurin hjá Tjóðveldisflokkinum verður seinni í mánaðinum.

# ST svaraði sum væntað

*Formaður Javnaðarflokksins heldur, at einki óvæntað er í svarinum hjá ST til landsstýrið*



*- Heimastýrislógin er ein veruleiki, og tí eigur landsstýrið fylgja henni, um tað dámar tað ella ikki, sigur Jóannes Eidesgaard*

EYÐUN KLAKSTEIN

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, heldur, at svarið, sum landsstýrið nú hevur fingið frá ST, er júst tað, sum roknast kundi við frammanundan.

- ST kann ikki svara stórt øðrvísi, enn teir hava gjørt. Tað eru greiðar reglur fyri, nær ST kann fara uppí altjóða samráðingar, og tað høvdu serfrøðingar eisini sagt frammanundan, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Trupulleikin er, at tað eru nakrar samráðingar í gongd millum danir og føroyingar, og har føroyingar hava ilt við at góðtaka tað samráðingarúrslit, sum sær út til at verða tað endaliga. Og so royndir landsstýrið vil øllum snildum at snara trupulleikan yvir á onnur viðurskifti, heldur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru spentari, eftir at landsstýrið í almennum brævi til ST leggur Danmark undir ikki at vilja at samráðast. Og í altjóða høpi ger brævið Føroyar til skammar, heldur hann.

**Fylgja spælireglunum**
Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur, at hann einki hevur ímóti, at landsstýrið roynir at fáa upplýsingar um mannagongdir hjá ST, men hann heldur, at hátturin, sum tað er gjørt, er skeivur.

- Bæði Fólkafloksmenn og Tjóðveldismenn hava verið kropp á kroppi á høvuðsborgini hjá ST í New York, og teir áttu at vita, at formalitetir spælir týðandi leiklut í felagsskapinum. Tí kann tað undra, at eitt landsstýri, sum Anfinn Kallsberg er formaður fyri, yvirhøvur sendir slíkt bræv til ST, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Óansæð hvat tú heldur um heimastýrislógina - og hon trongir til at verða skift út sum skjótast - so noyðist tú at virða tær spælireglur, sum eru galdandi. Heimastýrislógin er ein veruleiki, og tí eigur landsstýrið fylgja henni, um tað dámar tað ella ikki, sigur hann.